# Fiskimálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 11/11-2020 |
| Mál nr.: | 20/00447-1 |
| Málsviðgjørt: | |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**uppboðssølu av veiddum fiski av botnfiski veiddur í føroyskum ella íslendskum sjógvi**

Við heimild í § 42 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, verður ásett:

**§ 1.** Í minsta lagi 30% av veiðu í rundari vekt, av hvørjum fiskaslagi sær sambært stk. 2,  avreitt av føroyskum fiskifari í einum fiskiári, skulu seljast um góðkenda uppboðssølu í Føroyum. Undantikin er veiða av rættindum latin bólki 5 sambært § 19, stk. 1, nr. 6 í løgtingslógini.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 fevnir um veiðu, í føroyskum ella íslendskum sjógvi, av toski, hýsu, upsa, kongafiski, brosmu, longu, havtasku og svartkalva.
*Stk. 3.* Ásetingin í stk. 1 fevnir um ósløgdan fisk, sløgdan fisk við høvdi og sløgdan, avhøvdaðan fisk.
*Stk. 4.* Umrokning sambært hesi kunngerð fer fram við umrokningarfaktorunum ásettir í kunngerð nr. 44 frá 9. apríl 2003 um umrokningarfaktorar.

**§ 2.** Brot á § 1 verða revsað við sekt, er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg.
*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2021.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert